


**Nancy Svendsen:**

# Fekk bræv uppá rím frá William Heinesen

**Í seinasta parti umrøddu við Svend Olesen og son hansara Óla Svend. Hesa ferð hva vit meira um ættina og serliga um Nancy, dóttir Óla Svend, sum bert gjørdist 24 ára gomul**




**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo


Tað var skeivur tekstur undir myndini av Óla Svend í seinasta parti. Kona hansara var Ellen Cathrina f. Johannesen f. 1859 av Velbastað.

Tað er kent, at tey hjá Óla Svend vóru sera væl við tey hjá Restorff. Óli var jú eisini skipari hjá teimum. Onnur arbeiddu hjá Restorff.

Hetta sambandið millum ættirnar fekk eisini fylgir. Ein systir Óla Svend var Elsa Maria Olsen f. 3. 10. 1857. Hon fær 2. apríl 1880 eina dóttir, sum kallast Anna Frederikka Olesen. Pápin er skrivaður at vera A.W. Restorff, son gamla Restorff. Hann var tá longu giftur við Sofiu Helenu, sum hann átti níggju børn við.

Tað einasta, sum er vitað við vissu um møðgurnar er, at tær eru báðar farnar til Danmarkar. Nancy Bjørklund greiðir frá, at tá ið hon var innløgd á sjúkrahúsi í Danmark í 1960-unum plagdi hon at fáa vitjan av eini Onnu, sum hon kallaði Anna "Abba," tí hon hevði eitthvørt samband við abba sín. Hetta kann væl passa at vera henda Anna. Hon var gift Rasmussen og átti í hvussu er eina dóttir, sum kallaðist Else.

Um børnini hjá Óla Svend kann sigast, at Julianna giftist í Danmark, Sofía giftist við Venzel Petersen, Svend doyði 20 ára gamal í Hull í Bretlandi í 1918, Sigrid giftist við Vilhelm Nielsen. Simon gekk burtur 45 ára gamal undir krígnum við svenska skipinum Atland.

Næstyngst var Nancy.

**Nancy var romantisk**

Tað ber til at siga eitt sindur um Nancy, tí hon hevur lagt ikki sørt av skrivligum eftir seg.

Hon hevur verið gávurík og eisini romantisk. Eftir hana liggur ein dagbók, har hon hevur yrkingar og viðmerkingar.

Í dagbókini liggur eitt turkað blomstur "Fra Christian Djurhuus's bryllup August 1917."

Nancy hevur uttan iva verið umsvermað, og romantisk hevur hon eisini verið. Hon greiður frá fleiri veitslum í klubbanum saman við manning av Beskytteren. Her tykist hon at hava verið serliga nógv saman við einum av manningini, Bornemann. Hann bjóðar henni við og fylgir henni eisini til hús. Hon greiðir gjølla frá teirra samskifti, og tað hevur verið rættuliga inniligt. Nancy fekk eisini eina gullnál frá honum.

Nancy dugdi annars væl at skriva. Eitt bræv liggur eftir hana, sum er sent til systrina Sigrid (Gigga), og er tað einar átta tættskrivaðar síður.

Nancy hevur arbeitt í handlinum hjá Zakarias Heinesen. Har arbeiddi hon millum onnur saman við Katrinu Christiansen, sum seinni fekk handil við sama navni. Her er Nancy so eisini komin at kenna William Heinesen.



*Nancy var eing ung gávurík genta, hon gjørdist bert 25 ár*

**Brævið frá William**

Nancy fer til Danmarkar í 1918 at vitja systir sína Julionnu. William er niðri um sama mundi. Nancy hevur skrivað William eitt bræv, og hon fær eitt svar aftur. Hetta er ikki eitt vanligt bræv, men tað er skrivað uppá rím saman við tekningum, sum lýsa innihaldið í brævinum. William er tá um 18 ára gamal, so hetta man vera eitt tað fyrsta listarliga avrikið hjá William, sum vit her endurgeva.

Ove sum er nevndur í brævinum, er Ove Lützen, sonur Jacob Lützen, sum eisini er umrøddur í røðini um Egil Djurhuus.

**Danmark er gott, Føroyar er betri**

Komin heim aftur úr Danmark hevur Nancy í august 1918 skrivað eina vakra yrking um sína ferð til Danmarkar. Hon skrivar fleiri kladdur.Tann fyrsta er á eini rokningsblaði hjá Z. Heinesen. Hetta bendir á, at hon er komin higar at arbeiða aftur, eftir at hon er komin heim úr Danmark. At enda er yrkingin við vakrari hondskrift førd inn í dagbókina.

Hon ljóðar so:

**Minder om Danmark**

Nu er jeg atter hjemme
hvor Stilheden er saa stor,
dog, jeg kan aldrig glemme
Landet hvor Solen bor.

Landet, hvor Solen
skinner,
har Skove med Fuglesang
Slotte med gyldne Tinder
Bække med Sølverklang.

Landet med Glæde og
Sommer,
har Blomster i tusindvis,
jeg møder smil hvor jeg
kommer,
alt aander til Solens Pris

Landet med ingen Fjælde
er mygt som fin Musik,
der kan jeg ej Taarer fælde ,
kun Glæde der indpas fik.

Der fik jeg Smilet tilbage,
der lærte jeg først at
forstaa,
at Lykken den vil jeg tage
herhjemme i Taagen graa.

Jeg lærte, at der hvor jeg
fødtes
vil jeg altid drages imod,
kun der kan det brudte
bødes,
kun der faar den svage
Mod.

Kun her vil jeg Stilheden
tage,
indhyllet i Taagen graa,
og mindes de glade Dage,
da først jeg Sollandet saa.



*NANCY SVENDSEN*
** 12. JANUAR 1894*
*† 13. FEBRUAR 1919*

*HVIL I FRED*

**Ringsted 18. Juli 1918**

*Kær Nancy!*
*Deres Brev af 17. Juli*
*overraskede mig gruelig.*
*Hvordan kom De dog afsted?*
*Og hvad rejste De dog med?*
*Det vilde da være ganske fjoget*
*at tænke, at De kom med Toget?*
*Aldrig det af Hu mig rinder,*
*At De ingen Vejne finder!*
*Jeg kan tro, at det var Grin*
*at se Opkrævningen fra Katrin,*
*hvordan var han ellers, Kjær*
*fik De Frokost – hm - med mer?*

*Nu paa næste Løverdag*
*rejser jeg i Ro og Mag*
*ind til Kongens København*
*(It is a very beautiful town!)*
*Næste Gang Jyllandstoget kommer*
*fra den lumre, jyske Sommer,*
*stiller jeg paa Banegaarden.*
*(Det er en Mand som har alt i Orden!)*
*Hundred Kroner laante jeg af Ove,*
*thi hin Nat jeg kunde ikke sove*
*af Angst for, om det lod sig gøre*
*at sende Check'en – ja, der kan De høre!*
*Jeg satte op den Morgentur og gik*
*i Stedet for til Oves Gross – Butik.*
*Naar jeg kommer ind igen til By'n*
*skal jeg have Penge med som Lyn.*

*Altsaa ses vi, Søndag, Kl. hvad?*
*Ja, det maa De skrive paa et Blad!*
*Konner Deres respektive Søster,*
*eller det at rejse ene Dem lyster?*

*Rüssel maa vi søge at undgaa*
*og Fru Marcher (i høj Grad) ligesaa,*
*men da jeg eventuelt maa alene ud paa Splejsen,*
*ma De helst se at opsøge Marie Nicolajsen.*

*Nu haaber jeg, at det bliver godt Vejr, ikke Regnesen*
*Venlig Hilsen, Deres Wm. Heinesen*



*Igen har Katrina skrevet!*



*Johs Hoved paa et Fad*

Men eydnan at koma til Føroyar hevur vart stutt. Longu 12. februar 1919 er hon deyð. Hildið verður, at hon hevur fingið sponsku sjúku, sum so nógv doyðu av um hesum tíðina.

Meira syrgiligt kundi tað illa vera. Men nú hava vit so reist henni eitt minni!

***Kelda: Nancy Bjørklund***

**Komandi partur:**
Næstu ferð umrøða vit Lorenstu, vermóður Charlottu, systir kaptein Simonsen



Kær Nancy!
Deres Brev af 17 Juli
overraskede mig gruelig.
Hvordan kom De dog af Sted?
Og hvad rejste De dog med?
Det vilde da være ganske fjoget
men da jeg eventuelt maa alene ud paa Splejsen,
maa De helst se at opsøge Marie Nicolajsen.
Nu haaber jeg, det bliver godt Vejr, ikke Regnesen.
Venlig Hilsen, Deres Wm. Heinesen.

*Brævið frá William Heinesen*